FÍGGJARMÁLARÁÐIÐ
MINISTRY OF FINANCE

Løgtingið
Tinghúsvegur 1-3
Postboks 208
110 Tórshavn

Tórshavn, 1. novenber 2019

J.Nr.: 19/00202

Svar upp á fyrispurning nr. 12/2019 eftir tingskipanini § 52a

Fyrispurning frá Johan Dahl, løgtingsmanni, settur Jørgen Niclasen, landsstýrismanni í fíggjarmálum, um sjóvegis samferðslukervið.

Fyrispurningurin er soljóðandi:

1. Hvussu gomul eru ferjur og skip hjá Strandferðsluni, og hvat verður mett er restlivitíðin hjá somu ferjum og skipum?
2. Hvussu stórar upphæddir eru brúktar til viðlíkahald fyri strandferðsluflotan seinastu 5 árini, býtt upp á farleiðir/ferjur/skip og ár?
3. Hvørjar avbjóðingar og trupulleikar eru í løtuni á ymsu sjófarleiðunum hjá Strandferðsluni, og hvussu er ætlanin at loysa hetta upp á stutt sikt og longri sikt?
4. Eru ætlanir um at seta pening av á fíggjarlógini fyri 2020 til nýíløgur av ferjum og/ ella skipum, um ikki, nær so?
5. Eru lagdar nakrar langtíðarætlanir fyri nýíløgur til ferjur og skip hjá Strandferðsluni?

Svar til spurningar 1 og 2:
Strandfaraskip Landsins hava í mong ár víst á, at tørvur er á at endurnýggja flotan hjá stovninum. Við undantaki av Smyrli og Teistanum er allur flotin ótíðarhóskandi og óneyðuga dýrur í rakstri. Í 2017 gjørdi skiparáðgevarafyritøkan Knud E. Hansen eina støðulýsing um standin á SSL flotanum. Í niðurstøðuni skrivar skiparáðgevingarfyritøkan millum annað: *"Samanumtikið kann sigast um flotan hjá Strandfaraskipum Landsins, at hann er rættuliga gamal við einum miðalaldri uppá 30 ár. Aldurin ger seg galdandi á serliga tveimum økjum. Annað er, at deyðvektin, lastaevnini, eru minkað rættuliga munandi, og hitt er, at tæringar í skrokkinum fara at gera um seg."* Øll frágreiðingin kann lesast á heimasíðuni hjá fmr.fo.

Viðlíkahaldskostnaður av ferjunum hjá SSL frá 2014 til 2018

Byggiár	1971	1976	1980	1994	2001	2005
Skip	Ritan	Sam	Ternan	Sildberin	Teistin	Smyril
Fíggjarár						
2018	819.000	2.568.000	4.429.000	1.292.000	4.130.000	8.574.000
2017	760.000	1.997.000	1.212.000	745.000	4.431.000	8.448.000
2016	1.300.000	1.506.000	4.538.000	1.068.000	3.623.000	10.589.00
2015	1.440.000	1.245.000	2.098.000	672.000	909.000	7.242.000
2014	1.337.000	1.071.000	2.098.000	590.000	909.000	4.192.000

- 2018 Ternan: Hekkutangi var illa tardur. Alt stálið skift í hekkutanga.
- 2016 Ternan: Høvuðsgear vóru illa slitin. Deilir máttu framleiðast.
- 2018 Sam: Høvuðsumvælt skrúvuútbúnað. Skift skrúvubløð og nakað av stáli.
- 2016-2017 Sam: Skift stóran part av dekkinum.

Svar til spurning 3:

Ein stórur trupulleiki hjá Strandfaraskipum Landsins er, at flestu skipini eru gomul og tæringur ger um seg. Samstundis økist trýstið á tænastustøðið.

Í mai 2020 kemur nýggi eykabáturin hjá Strandfaraskipum Landsins, hann fær avloyst nøkur av skipunum, tá ið tørvur er á tí.

Landsstýrið arbeiðir við at finna eina loysn uppá, hvussu avbjóðingarnar kunnu loysast.

Frágreiðingin hjá Knud E. Hansen geva skipunum “prógtøl”. Av 25 møguligum stigum, fáa skipini hesar metingar:

Sildberin	Ritan	Sam	Ternan	Teistin	Smyril
7	10	10	15	20	24

Svar til spurning 4

Landsstýrið arbeiðir í løtuni við fíggjarlógini fyri 2020 og tað arbeiðið er ikki liðugt enn.

FÍGGJARMÁLARÁÐIÐ
MINISTRY OF FINANCE

Svar til spurning 5

Í samgonguskjalinum stendur at *"Avgerandi fyri trivnaðin er eitt gott samferðslukervi har oyggjarnar verða knýttar saman. Tí verður ein samferðsluætlan gjørd, har íløgur í tunlar, undirsjóvartunlar, vegakervi og ferjur verða raðfestar innanfyri langtíðar løgukarmin."* Næstu tíðina fer landsstýrið undir at gera langtíðar løgukarm og í tí arbeiðinum skal eisini leggjast tíðarætlan fyri útskifting av skipum hjá SSL.

Tinganes, 1. november 2019

Jørgen Niclasen
Landsstýrismaður í fíggjarmálum